FRÓÐSKAPARSETUR · FØROYA ·

# CAMBRIDGE EXAMINATIONS

***First Certificate in English (FCE)***
***– Próvtøkan verður 14.06.2011***

***Certificate in Advanced English (CAE)***
***– Próvtøkan verður 15.06.2011***

***Certificate of Proficiency in English (CPE)***
***– Próvtøkan verður 16.06.2011***

*Munnligu próvtøkurnar verða seinastu vikuna í mai 2011*

Tilmeldingarfreistin er úti 18. mars 2011 kl. 12.00

**Tilmeldingargjald:**
First Certificate in English . . . . . . . . . . **1.300,- kr.**
Certificate in Advanced English . . . . . . **1.400,- kr.**
Certificate of Proficiency . . . . . . . . . . . **1.500,- kr.**

Tilmeldingarblað og onnur kunning er at finna á heimasíðu okkara www.setur.fo og fæst eisini við at venda sær til Setursskrivstovuna tlf. 35 25 00 millum kl. 9.00 - 16.00.

Vegleiðing um gjaldið er at finna á tilmeldingarblaðnum.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

**Klaksvíkar Sjúkrahús**
Tlf: 45 45 45 lokal 123
Fax: 45 73 63 · 700 Klaksvík

# Ortopædiskur skómakari og bandagistur frá SAHVA

verða á **Klaksvíkar Sjúkrahúsi**
12. og 13. apríl 2011

Tíð fæst við at ringja á
Klaksvíkar Sjúkrahús, tlf. 45 45 45,
**mánadag og týsdag kl. 10 – 12**

**Seinasta freist at biðja um tíð, er týsdagin 5. apríl 2011**

**SAHVA**

# Framleiðslu formenn

**Til felag okkara**
**P/f P. P. Faroe Pelagic, Kollafirði**

søkja vit eftir fólki til at starvast sum dagligir leiðarar í framleiðsluni á virki okkara.

Felagið varð sett á stovn í desember 2009 og er nú í gongd við at víðka um virksemi á virkinum. Í løtuni framleiðir felagið í høvuðsheitum frystan fisk. Um neyðugt verður framleitt alt samdøgrið. Felagið hevur ætlanir um at økja framleiðslunøgdina upp í 1.000 tons um dagin. Hetta verður ætlandi klárt í mai í ár. Í árinum er ætlanin eisini at byrja framleiðslu av kruvdum/avhøvdaðum, flaki og flaktum.

Tey, sum setast skulu í starv, mugu hava góðan kunnleika til øll viðkomandi øki viðvíkjandi dagligu framleiðsluni av fiski á virki okkara. Royndir innan líknandi arbeiði er ein fyrimunur.

Hetta er ein frálíkur møguleiki at gerast partur av tí, ið kemur at vera ein tann største framleiðslueindin í Evropa.

Tú kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við framleiðslustjóran. Væntað verður, at tú hevur viðkomandi útbúgving ella upplæring og praktiskar royndir á økinum, og at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur initiativ til sjálvur at taka stig til at fremja tær neyðugu arbeiðsuppgávurnar. Tú kemur at hava ábyrgd av framleiðslu og starvsfólkunum á vakt. Umsøkjarin má vera fjølbroyttur, kreativur, arbeiðssamur, og duga at leiða og samskipa arbeiðið.

Kunnleiki til enskt – bæði í skrift og talu – er ein fyritreyt, tí ein partur av samskiftinum verður á enskum.

Størvini skulu setast so skjótt sum gjørligt. Í seinasta lagi í apríl 2011.

Løn sambært avtalu.

Ynskjast nærri upplýsingar, kann ringjast til Aad de Jong (+31 653 266167) ella senda teldupost til management@ppfaroe.fo.

Allar umsóknir, sum sjálvsagt verða viðgjørdar í trúnaði, skulu sendast til
**P/f P.P. Faroe Pelagic**
**Postboks 49**
**FO-410 Kollafjørdur**

ella helst við telduposti á:
management@ppfaroe.fo
í seinasta lagi 20. mars 2011.

# Mini íbúð til leigu

Mini íbúð, 12 m², í vesturbýnum til leigu.
Bert egnað til eitt fólk.
Egin inngongd, 2 rúm + mini køkur og mini bað + wc.
Friðarligt umhvørvi.

***Tlf. 217300***

**www.sosialurin.fo**

FRÓÐSKAPARSETUR · FØROYA ·

# VÍSINDASTARVSFÓLK Í SJÚKRARØKTARFRØÐI Á FRÓÐSKAPARSETRI FØROYA

Á Sjúkrarøtarfrøðiskúlanum á Fróðskaparsetrinum er eitt granskingar- og undirvísingarstarv í sjúkrarøkt leyst at søkja.
Tann, ið sett/ur verður, skal serliga virka fyri at menna gransking og útbúgving í sjúkrarøkt á Fróðskaparsetrinum.

**Starvsøki**
Granskingarparturin verður knýttur at serøki umsøkjarans, men umsøkjarin skal eisini vera sinnaður at granska í sjúkrarøkt í Føroyum. Samstarv við aðrar mentanarstovnar og onnur fakøki innan- og uttanseturs er týdningarmikið í starvinum.

Undirvísingarparturin fevnir um útbúgvingar og skeið á masterstøði á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum. Menningarparturin fevnir um førleikamennandi skeið til vísindastarvsfólk á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum, so tey kunnu fara undir gransking og PhD-útbúgving. Harumframt skal umsøkjarin virka fyri at vísindastarvsfólk á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum fáa førleikamennandi skeið at búgva seg til at fara undir gransking og PhD-útbúgving.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu umframt kandidatútbúgving í sjúkrarøktarfrøði (cand.cur. ella cand.scient.san.) hava granskingarførleika á lektarastigi, undirvísingarroyndir og góð samstarvsevni.

Við umsóknini skulu, umframt CV og lýsing av egnum granskingarprofili og framtíðarætlanum umsøkjarans við starvinum, eisini fylgja yvirlit yvir øll vísindalig avrik umsøkjarans. Tey 10 bestu vísindaligu avrik umsøkjarans skulu leggjast við umsóknini í fýra eintøkum.
Starvið verður sett í samsvari við førleikameting hjá metingarnevnd, og ein setanarnevnd gevur rektaranum tilmæli um, hvør setast skal.

**Umsókn**
Umsóknarfreist er 21. mars 2011.
Starvið verður sett 15. august 2011 ella eftir avtalu.

Løn og starvstreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til rektaran fyri Sjúkrarøktarfrøðiskúlan Súsonnu Mortensen, tlf. 352250/292255, susannam@setur.fo ella til rektaran á Fróðskaparsetri Føroya, Jóan Pauli Joensen, tlf. 352503/292503, jopajo@setur.fo.
Umsóknir við avriti av prógvum, ævisøgu (CV), vísindaligum avrikum og lýsing av granskingaprofili og framtíðarætlanum v.m. skulu sendast til:

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovuna
J. C. Svabos gøtu 14
Postrúm 272
FO-110 Tórshavn
tlf. 35 25 00